

*Trina í Meiðlendi kláraði tað, sum læknarnir ikki megnaðu*



*Ziska Hammer fórst saman við trimum stjúksynum í 1907*



*Jaspur, beiggi Niels, og Mina Tausen. Hann gav lívið fyri vinin*



*Niels Tausen fórst við Karen í 1920*

bera til at fáa pening fyri einki at gera.

Dam peikaði á børnini á gólvinum og segði, at hesi skuldu gjalda! Hetta ljóðaði merkiligt tá, men gjørdist skjótt almenni politikkurin. Sjálvur vildi hann ikki taka ellisrentu fyrr enn hann var 70 ár, hóast hann kundi fingið hana fyrr.

Tá ið Danjal var blivin gamal helt hann, at hvørt orð, Petur Mohr Dam hevði sagt var gingið í uppfyllilsi, og hann gjørdist javnaðarmaður um ein háls.

Danjal var vinmaður við øll tey, har hann búði á Tvøroyri. Alt sítt lív hevði hann samband við Volmar Bech úr húsinum hjá Agnes.

Hetta má sigast at vera eitt einastandandi avrik hjá einum einsamallum manni at taka eitt slíkt hús uppá seg. Hann dugdi alt, og húsið var so væl passað, sum nakar kundi gera tað.

Øll børnini vóru sjálvsagt góð við hann, og hann doyði út hjá fosturdótrini Marin Elisabeth.

Táið hann fylti 90 ár varð nógv gjørt burtur úr degnum, millum annað við at bjóða kransakaku. Tey hildu tá fyri við Danjal, at kransakøku hevði hann ikki fingið fyrr! Jú, hann hevði verið í brúðleypi hjá kenda bakaranum í Havn, Andreas í Horni f. 1874 og hevði fingið kransakøku tá. Hetta var í 1900. Men slíka hevði hann ikki sæð síðan tá. Andreas hevði nevniliga rimmar brúðleyp bæði í Havn og í Øravík, haðani kona hansara Jacobina var ættað.

Tað var annars tað sjáldsama við hesum børnum, at tey øll búsettust í Hovi. Hetta man Danjal eiga sín part av æruni av.

## Fýra brøður doyðu á sjónum

Ein annar sum fórst við Karen var tann 36 ára gamli Niels Tausen, giftur við Onnu Malenu, og sum doyði frá trimum døtrum. Tann yngsta livir enn. Hetta er Nathalia Tausen, sum hevur verið jarðamóðir eitt langt lív.

Her kann verða vert at nevna lagnurnar á sjónum hjá trimum av brøðrunum hjá Niels, sum eisini fórust á sjónum.

Ein beiggi var Jaspur Tausen, sum giftist til Eiðis. Hann var við Florence í 1928, tá ið saman-stoytur var við eitt annað føroyskt skip. Samstundis varð stóri báturin á Florence oyðilagdur.

Jaspur hevði sum bestimaður verið við til at biðja fólkið, og millum hesar var ein eldri eiðismaður, Marius, sum var vinmaður hansara. Florence fór at søkka, og eftir var bert tann minni báturin, har tað bert rúmaðust



*Súsanna, misti mannin í 1920 og doyði sjálv í 1925*



*Katrina, dóttir Súsannu, doyði 20 ára gomul, og fór til gravar sama dag sum mamman. Tær fóru í somu grøv*

10 av teimum 17 monnunum umborð.

Jaspur var í fyrsta umfari komin í bátin, men sum yvirmaður helt hann tað ikki vera hóskandi at blíva bjargaður, meðan hansara vinmaður, sum hann sjálvur hevði biðið við, druknaði. Jaspur tók tá tað einastandandi stig, at fara upp aftur á søkkandi skipið og bað Marius taka sítt pláss.

Jaspur druknaði sostatt frá konu og seks børnum, bert 35 ára gamal. Hetta má sigast at vera ein einastandandi hending. Ein langabbasonur hansara er annars kendi svimjarin Pál Joensen.

Ein beiggi var Martin Tausen. Hann tók skiparaprógv í 1935. Í 1949 lat hann Saksaberg byggja.

Hann gekk burtur við einum íslendskum báti í 1964, 59 ára gamal. Lívið hevur ikki verið lætt hjá teimum. Mamman doyði, tá ið børnini vóru smá.

Undir krígnum sigldi hann so gott sum alla tíðina til Onglands við fiski. Hann fekk orð fyri at vera nervasterkur sum fáur.

Sjálvur misti Martin eisini konuna, tá ið yngsti sonurin var heilt lítil.

Henrik var føddur í 1899 og tók skiparaprógv í 1920. Í 1929 og 1930 førdi hann Johannu. Hann fórst við Grasinum í 1943.

## Vanlukkan í 1907

Hov hevur verið sera hart rakt av vanlukkum á sjónum, serliga árini 1907-1920. Í 1920 fórust fimm mans við Karen. 1914 fórust John Danielsen og Hans Pauli Luid við Robert Miller, Hans Pauli Midjord gekk burtur við Norðstjørnuni í 1910 og Niels Anthonius Smidth sló út av Falkinum í 1909.

Men tann ræðuligasta vanlukkan hendi 15. mai 1907, tá ið átta menn og dreingir úr Hovi druknaðu.

Dimmalætting skrivar um hesa vanlukku, at farið var við einum fýramannafari av Hov til Tvøroyri eftir einum kalva hjá trimum av manningini við Carl, sum eisini vóru við bátinum.

Veðrið var gott á morgni, men út á dagin ilskaðist tað. Tá ið báturin skuldi fara aftur til Hovs klokkan fýra seinnapartin, var rættuliga illfýsið. Hetta saman við tí, at báturin var tungt lastaður av fólki og førningi man hava elvt til vanlukkuna. Dagin eftir varð báturin funnin brotin saman við einum líki sunnarlaga í Hovsvíkini.

Teir sum fórust vóru:

· Johan Olaus Nicolai Hofgaard, nevndur Lávus uppi í Stovu, 36 ár
· Hans Jacob Thomsen, Hans í Gloppinum, 27 ár
· Joen Pauli Eliesar Bech, 11 ár
· Poul Nicolai Midjord, 9 ár
· Danjal Johannes Ziska Hammer, 30 ár,
· Thorer Mikal Nattestad, 18 ár
· Johan Nattestad, 15 ár
· Joen Pauli Nattestad, 13 ár

Eftur Dánjal Johannes Ziska Hammer sótu einkjan Elspa i Trøðini og 3 børn í aldrinum 3-11 ár. Fyrri maður Elspu doyði 12 ár frammanundan, og nú misti hon eisini triggjar synir frá fyrra hjúnarlagnum. Hetta vóru teir dreingirnir, sum itu Nattestad. Pápin var úr Miðvági. Seinni doyði ein fjórði sonur, Niels Pauli. Hetta var í 1922, tá ið Carl varð ásigld av eingilskum trolara við Vestmannaoyggjarnar og fekk stóran skaða. Niels Pauli lat lív í hesi hending. Niels Pauli var kendur fyri at duga so sera væl at syngja.

Nú átti Elspa tríggjar døtur eftir. Ein teirra Karin Elisa doyði 25 ára gomul frá tveimum smáum børnum. Sigast kann, at Elspa sjálvt eftir tátíðar umstøðum hevur havt eina skakandi lagnu.

Eftir Johan Olaus Hofgaard sótu trý børn eftir, tey vóru 3-6 ár. Konan doyði árið frammanundan, so nú vóru hesi børn foreldraleys. Børnini máttu fara aðra staðni at vera. Omman, sum var eftir í húsinum, var blind, so hon fekk einki gjørt. Daniella fór Oman Lon í Hovi og giftist við Magnus Johansen á Strondum. Dalli fór at vera hjá Susannu og Lávus og kom at vaksa upp saman við teirra børnum. Dalli giftist við Karin Elisu hjá Elspu. Hann kom tískil í ungum aldri at missa foreldur, fosturforeldur og konu.

Johanna giftist á Tvøroyri við Johannes Djurhuus ættaður av Selatrað.

Hjá Hans Jacob Thomsen sótu trý børn eftir. Kona hansara var deyð í februar sama ár. Børnini fóru tískil til ætt í Hovi at vera. Ein dóttir Elisabeth giftist við Johan Danbjørg.

Dimmalætting veit eisini at siga, at nakrir av monnunum vóru tryggjaðir í danskari trygging fyri fiskimenn, meðan aðrir ikki vóru tað.

Í nevnda tíðarskeiði doyðu 17 menn og dreingir á sjónum í Hovi. Hetta hevur rættuliga munað í so lítlari bygd.

## Partur av søguni

Nú er komið til endan av hesi røð. Hon gjørdist drúgvari enn ætlað. Fyrst var ætlanin bert at skriva um, at 85 ár vóru liðin síðan General Gordon gekk burtur í 1924. Men tað fall tá náttúrligt at umrøða tær vanlukkur, sum høvdu verið árini frammanundan eisini. Hetta er millum annað gjørt við skrivligum keldum og so eisini munnligar keldur, sum prátað hevur verið við í samband við hesa røð. Tøkk skulu tey øll hava fyri tað.

Hesar vanlukkur kostaðu úti við 80 monnum lívið, nógv teir flestu suðringar. Hetta er bert ein lítil partur av okkara lagnusøgu.

Tíverri er nóg mikið av tilfari til nýggjar frásagnir um líknandi hendingar.

## Manningin á Helenu

Í seinasta parti høvdu eina mynd av manningini á Helenu, sum gekk burtur í 1920. Vit høvdu eisini nøkur nøvn. Eitt var skeivt. Har tað stóð Poul Michelsen skuldi sjálvsagt standa Mikkjal Michelsen, sum var skipari. Vit hava fngið tvey nøvn afturat. Maðurin í ovasta raðnum nr. 2 frá høgru er Jens Sigvard Ingvald Mikkelsen. Maðurin uttast t.v. í miðraðnum er beiggi hansara Johan M. Michelsen. Vit vilja fegin frætta um fleiri nøvn

**Komandi partur**

**Komandi tvær Miðvikurnar verða um Dánjal á Hvítanesi**

Sosialurin